HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Royndarveiða við línu á Føroyabanka í 2021

Tórshavn · Apríl 2022



Dagunn H. J. Clementsen

Petur Steingrund

HAVSTOVAN NR.: 22-04
SMÁRIT

# Innihald

Vísindaligar rannsóknir á Føroyabanka................. 3

Øki og tíðarskeið ............................................. 3

Kortlegging av útbreiðslu .................................... 3

Agn......................................................................... 3

Húkur ..................................................................... 3

Mistur reiðskapur ................................................ 4

Eygleiðari............................................................. 4

Hjáveiða ................................................................. 4

Útblak..................................................................... 4

Skrásetingar .......................................................... 4

Ásetingar ............................................................... 4

# Vísindaligar rannsóknir á Føroyabanka

Havstovan hevur, sambært § 51, stk. 1 í sjófeingislógini, sum eina av uppgávunum at menna fiskiskap og hevur, sambært § 51, stk. 2, loyvi at gera vísindaligar rannsóknir í føroyskum sjógvi.

Í 2021 skipaði Havstovan fyri 7 royndarverkætlanum saman við 7 ymiskum stigtakarum (Talva 1).

Heitið á verkætlanunum var:

> ***Línuveiða á Føroyabanka fyri at kortleggja nøgdir og útbreiðslu av botnfiski, serliga toski***

# Endamál

Endamálið við royndarverkætlanunum var at kanna nøgd og útbreiðslu av fiski, sum kemur á línuna og serligur dentur var lagdur á tosk. Endamálið var at skaffa vitan, sum kann brúkast til at skipa ein møguligan framtíðar fiskiskap á Føroyabanka. Eitt annað endamál við royndarverkætlanunum var at fáa meira vitan um nøgdirnar av toski á Føroyabanka – havandi í huga tann góða fiskiskapin hjá Magnusi Heinasyni í mars 2020 og 2021.

# Øki og tíðarskeið

Økið fevndi um Føroyabanka, frá tí grynsta og niðureftir, tó ikki tað økið, sum longu er loyvt til vinnuliga veiðu. Tíðarskeiðini vóru ymisk, smáu bátarnir fóru fyrst, síðani teir størru (Talva 1). Fyrsti bátur fór út tann 10. juli 2021 og seinasti bátur kom inn aftur 14. desember 2021.

Miðast skuldi ímóti at royna á øllum økjum á Føroyabanka.

# Kortlegging av útbreiðslu

Miðað varð ímóti at seta stubbar á umleið 5 fjórðingar í nøkulunda beinari linju. Fyri hvønn stubba vórðu nøgdir (rund vekt) av fiski skrásettar í serliga skipsdagbók, sum var gjørd til høvið. Fyri tosk varð so vítt gjørligt skrásett positión og longd og vekt fyri hvønn einstakan tosk, sum kom á línuna. Sambært endamálinum um at kortleggja útbreiðslu av botnfiski á Føroyabanka var álagt, at tað ikki skuldi setast aftur í sama staði, men at tað varð flutt í minsta lagi 1,5 fjórðingar. Tó kundi setast aftur í sama staði, um meira enn ein vika var farin síðan seinast.

# Agn

Skipini brúktu agn eftir egnum ynski, eins og til vanligan vinnuligan fiskiskap.

# Húkur

Einki krav var um slag ella stødd á húkum, men sagt varð, at tað var ein fyrimunur um skipið brúkti tað slag og stødd av húkum, sum er vanligt í línuveiðu undir Føroyum. Hetta er fyri betur at kunna samanbera royndirnar á Føroyabanka millum skip.

*Talva 1. Bátar, sum luttóku í royndarverkætlanum við línu á Føroyabanka í 2021.*

| Bátur/ Havnakenningarnr. | Radiokallimerki | Tíðarskeið |
|---|---|---|
| Stakkavík KG 748 | OW2095 | 10. jul. - 15. aug. 2021 |
| Anru KG 730 | XPSI | 19 jul. - 19. aug. 2021 |
| Brandur KG 557 | OW2198 | 25. aug. - 7. sep., 15. sep. - 29. sep. 2021 |
| Fiskivarði VN 559 | OW2366 | 23. aug. - 7. sep., 15. sep. - 22. sep. 2021 |
| Kambur FD 454 | OW2115 | 18. okt. - 1. nov. 2021 |
| Jákup B KG 7 | XPPR | 28. nov. - 12. des. 2021 |
| Eivind VA 132 | XPQE | 1. des. - 14. des. 2021 |

## Mistur reiðskapur

Um lína varð mist í sambandi við royndarverkætlanina, skuldi skipið gera sítt til, at reiðskapurin varð fingin uppaftur. Um hetta varð mett at vera ein trupulleiki, kundi Havstovan siga avtaluna upp.

## Eygleiðari

Havstovan tryggjaði sær rættin at senda eygleiðara umborð á skipið. Eygleiðarin skuldi onga ábyrgd hava av, hvar og nær tað skuldi roynast, ella um verkætlanin átti at enda ella ikki. Skipið skuldi rinda kostnað fyri eygleiðaran, meðan hann var umborð sambært sáttmála fyri eygleiðarar.

Um tað ikki eydnaðist Havstovuni at fáa eygleiðara, kundi verkætlanin tó halda á fram, um skip og Havstovan blivu samd um tað og funnu eina aðra nøktandi loysn á spurninginum um eygleiðing og prøvatøku.

Eingin eygleiðari frá Havstovuni var við hesum 7 skipunum.

## Hjáveiða

Eingi krøv vóru um hjáveiðu, tí roynt varð eftir øllum vanligum fiskasløgum, sum koma á línu. Tó vóru t.d. hemari og onnur fiskasløg á reyðalista undantikin. Miðast skuldi ímóti ikki at leggjast á nakað ávíst fiskaslag ella at sleppa undan nøkrum fiskaslagi. Tað var ikki loyvt at veiða nakrar aðrar livandir verur enn tær, sum náttúrliga koma á línuna.

## Útblak

Útblak av matfiski (fiskur, sum undir vanligum umstøðum hevði farið í lastina) í sambandi við royndarverkætlanina gav Havstovuni grundarlag fyri at siga avtaluna upp við virknaði frá sama degi.

## Skrásetingar

Serlig skipsdagbók frá Havstovuni varð førd við nágreiniligum upplýsingum um knattstøður, tíðarfestingar og veiðu fyri hvønn stubba, sum settur varð. Eisini blivu prøvar av longd og vekt av ymsu fiskasløgunum í veiðuni tiknir. Havstovan lat skipinum prøvaørk, har skrásetingarnar skulu førast inn.

Allar skrásetingarnar (skipsdagbók og prøvaørk) skuldu vera Havstovuni í hendi eftir hvønn túr og nýggjur túrur mátti ikki byrjast fyrr enn skrásetingarnar vóru latnar Havstovuni. Um ongar skrásetingar vóru komnar 14 dagar eftir, at túrurin endaði, ella um skrásetingarnar vórðu mettar at vera ófullfíggjaðar, gav hetta Havstovuni grundarlag fyri at uppsiga avtaluna.

## Ásetingar

Havstovan stóð sum formligur leiðari fyri verkætlanunum og heitti á stigtakararnar um at fremja royndarverkætlanirnar í verki.

Miðast skuldi ímóti, at fiskiskapurin í sambandi við hesar royndarverkætlanirnar ikki darvaði øðrum fiskiskapi og ikki elvdi til óneyðuga og ógvusliga ónøgd millum manna.

Nágreinilig skipsdagbók skuldi førast við neyvum upplýsingum um hvønn stubba. Eisini skuldu longd og vekt av úrvaldum fiskasløgum (til dømis toski, hýsu og longu) verða mátað fyri onkrar av stubbunum eina ferð um dagin. Hvør prøvi kundi vera upp til 30 fiskar.

Havstovan tók onga ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftunum hjá stigtakarunum í samband við royndarverkætlanirnar. Skipini áttu veiðuna, sum varð fingin, undantikið tær (smáu) nøgdir av fiski, sum vegna eina prøvatøku møguliga ikki kundu landast/seljast.

Royndarverkætlanirnar vóru ein vísindalig roynd, har endamálið er at fáa svar upp á ávísar ítøkiligar spurningar. Í hesum liggur, at royndarverkætlanirnar ikki neyðturviliga tóku vinnulig atlit ella atlit til, hvussu ein framtíðar fiskiskapur skal skipast.

Royndarverkætlanirnar geva stigtakarunum ongan eyka rætt til framtíðar verkætlanir av hesum slagi samanborið við framtíðar stigtakarar.

Royndarverkætlanirnar geva ikki øðrum framtíðar stigtakarum nakran sjálvsagdan rætt at kunna luttaka í samsvarandi verkætlanum.

Royndarverkætlanirnar geva ikki stigtakarunum nakran eyka rætt til eina møguliga framtíðar vinnuliga veiðu í mun til framtíðar stigtakarar.




*Mynd 1. Línusetur pr. bát á Føroyabanka í 2021, her teknaðar sum beinar linjur millum byrjanar- og endapositión.*




*Mynd 2. Toskar við eksaktari positión í línuroyndunum á Føroyabanka í 2021 (pr. bát).*




*Mynd 3. Allar línuseturnar frá royndarveiðuni á Føroyabanka í 2021. Á lítla kortinum síggjast eksaktar positiónir fyri tosk saman við línusetunum. Viðmerkjast skal, at eksaktar positiónir eru frá 6 av 7 bátum.*




*Mynd 4. Allir toskar við eksaktari positión, býttir upp eftir stødd.*




*Mynd 5. Longd móti vekt fyri tosk, hýsu, brosmu, longu og kalva frá royndarveiðu á Føroyabanka í 2021.*

*Talva 2. Veiða upp á roynd (CPUE) pr. bát og sum miðal fyri allar línubátarnar á Føroyabanka í 2021.*

| | kg/1000 húkar | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Toskur | Hýsa | Brosma | Longa | Kalvi |
| Stakkavík KG 748 | 4 | 198 | 12 | 73 | 0 |
| Anru KG 730 | 3 | 188 | 14 | 114 | 2 |
| Brandur KG 557 | 3 | 211 | 26 | 101 | 0 |
| Fiskivarði VN 559 | 2 | 190 | 9 | 109 | 0 |
| Kambur FD 454 | 3 | 165 | 26 | 105 | 0 |
| Jákup B KG 7 | 10 | 413 | 14 | 72 | 0 |
| Eivind VA 132 | 9 | 259 | 25 | 97 | 0 |
| Í miðal | 5 | 237 | 18 | 99 | 0 |

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo